90 SEKUND

# JÁKUP MIKKELSEN

LAGT TIL RÆTTIS: Leo Poulsen




# MEISTARAHEITIÐ við Herfølge størsta upplivingin

**JÁKUP MIKKELSEN** VAR KALLAÐUR INN SUM **BJARGINGARMAÐURIN** TIL DYSTIRNAR MÓTI SLOVENIA OG NORÐURÍRLANDI, NÚ **GUNNAR NIELSEN** VAR SKADDUR. OG SERLIGA MÓTI **NORÐURÍRLANDI** VÍSTI HANN SEG SUM EIN RÆTTAN **BJARGINGARMANN**. MEN VIT SKULU IKKI VÆNTA AT SÍGGJA HANN AFTUR Á FØROYSKA **LANDSLIÐNUM** – UTTAN SO, AT TALAN VERÐUR UM EINA **NEYÐSTØÐU**

**Tú kom aftur á landsliðið til dystirnar móti Slovenia og Norðurírlandi, eftir at tú hevði sagt liðnum farvæl, kunnu vit síggja teg aftur á landsliðnum í einari neyðstøðu?**
Tá skal talan verða um eina neyðstøðu. Annars ikki.

**Tú ert róstur upp um skýggja fyri tín innsats móti bæði Slovenia og kanska serliga móti Norðurírlandi, gevur tað ikki blóð á tonnina?**
Nei, slett ikki, heldur hinvegin, tað gevur mær góða samvitsku at gevast.

**Um tú hugsar aftur á landsliðstíðina, hvat metir tú so sum tín besta dyst?**
Tað var á útivølli móti Litava, eg haldi tað var í 99. Vit spældu 0-0.

**Hvat er tín mest skuffandi fótbóltsuppliving?**
Tað er niðurflytingin við KÍ í fjør.

**Eitt stig móti Norðurírlandi er gott úrslit, men hvat metir tú sum besta úrslitið, tú hevur fingið á landsliðnum?**
Tað má vera 2-1 sigurin á Litava í fjør.

**Føroyar hava higartil fingið eitt stig í undankappingini, hvat skal til fyri at tú metir kappingina vera nøktandi fyri føroyska landsliðið?**
Í hvussu er at tey tapini, vit kunnu vænta, ikki verða ov stór, men at vit kunnu minka munin niður í eitt og tvey mál. Hartil havi eg vónir um, at vit kunnu fáa trý stig móti Estlandi, og fáa vit tað, hevði eg hildið tað verið nøktandi.

**Hvat er tín besta fótbóltsuppliving nakrantíð?**
Tað má nokk vera meistaraheitið við Herfølge í 2000.

**Tú hevur leikt undir fýra landsliðsvenjarum, hvør er størsti munurin á teimum?**
Fyrst hevði eg Allan Simonsen, og tað var ógvuliga stórt at spæla undir honum, tí hann var ein so stór persónligheit, og mann vildi fegin vísa nakað fyri honum. Síðani kom Hendrik Larsen, og hann skapti ein ógvuliga postivan stemning. Hann var ein ógvuliga fittur fýrur, og hjá honum var tað ikki so stívt, sum hjá Allan og Jógvan Martin. So kom Jógvan Martin Olsen, sum var ógvuliga grundigur, men tá kendi mann seg nógv tættari at venjaranum, meðan tað við Allan var ein ávís frástøða. Jógvan Martin var eisini ógvuliga sterkur taktiskt, men tú fekst diskuterað tingini við hann, tí tú vart tættari upp á. Nú hava vit so fingið Brian Kerr, sum minnir eitt sindur um Allan Simonsen. Hann er kanska tann mest professionelli av teimum øllum, og hevur tilført eina professionalismu inn í landsliðshópin. Hann setur ógvuliga stór krøv til bæði hópin og til umstøðurnar, alt skal vera í lagi.

**Frá tú byrjaði á landsliðnum fra til í dag, hvørja menning hevur tú merkt á liðnum?**
Tað er eitt sindur trupult at svara upp á. Eg haldi, at yvirhøvur er fótbólturin rættiliga nógv mentur í Føroyum. Eg haldi, at liðið spælir nógv betri í dag, enn tá vit byrjaðu fyri 20 árum síðani.

**Tú spælir í ár við ÍF, komandi ár verður KÍ í Vodafondeildini aftur, hvar verður tú at síggja komandi ár?**
Eg havi ikki rættiliga tikið støðu til enn, um eg haldi fram at spæla ella ikki, men eg dugi illa at ímynda mær, at eg verið at finna á KÍ-liðnum komandi ár, tí teir hava góðan málmann.

»Kunnu vit fáa trý stig móti Estlandi, er kappingin nøktandi